


*Her er Tróndur í Gøtu í Aberdeen og landar. Á myndini síggjast Leon Joensen reiðari t.h. og svágur hansara Johannes Samuelsen í Horni í Havn. Eftir sigarføringini at døma stendur ikki heilt illa til!*



*Hendan tekningin av Norðragøtu er úr landbúnarálitinum frá 1911. Teknarin er Johs. Klein. Myndateksturin er: Bygden Nodregøte paa Østerø. Nederst Fjældet ses Bygdens Huse med Kirke og Baadskur, bag dem paa Fjeldskraaningen den opdyrkede Bø med Agrene, omgivet af Stengærder. Nyopdyrkninger slutter sig hertil. Gennem Bøen fører Vej for Kreaturene til Udmarken (geil.) Ret over Bygden over Fjeldet fører en Sti til Lervig.*



*Tað var stuttligt at spæla á sandinum í Syðrugøtu. Úti í síggjast systkinabørnini Oddvør Lómstein, Jórun Smith f. Joensen og Sigrun Samuelsen. Aftanfyri sæst Fiskavirkið, vanliga kallað Turkihúsið, sum eigur sín part av hesi søgu*

sunnukvøld. Tá fóru teir út og kundu kasta til vanliga tíð mánamorgun. Tað var munur á, sum manningin tá var betri fyri. Tað kom eisini minst líka nógv burturúr.

**Við Tróndi í Gøtu**

Eg fór so við Tróndi í Gøtu, tá ið hann kom í 1947. Har var eg fýrbøtari. Hann var ein av teimum mongu trolarunum, sum komu til Føroyar eftir kríggið.

Tað vóru nógvir sum vildu sleppa við, so menninir máttu skiftast at vera við. Tískil var eg bara nakrar túrar við, tilsamans 117 dagar. At vera fýrbøtari var eitt sera hart arbeiði, sum fólk illa kunnu ímynda sær í dag. Hesir trolarar brendu kol. Tá farið var avstað, var skipið næstan fult av koli. Tað stóra arbeiði var tí at fáa kolið til dampmaskinuna og í fýrin. Síðan var at fáa øskuna fyri borð. Undir sigling varð serliga nógv kol brúkt. Tá kom onkur av manningini at hjálpa til sum "lempari". Men undir fiskarí var alt hetta arbeiði hjá fýrbøtaranum.

Men ein fyrimun høvdu fýrbøtararnir kortini. Teir vóru tríggir sum gingu vakt, tí kom arbeiðsdagurin "bert" at vera átta tímar. Richard Jacobsen var skipari fyrstu árini.

Síðan var eg ein túr við trolaranum Krosssteini hjá Jákup Haraldsen upp undir jól. Grækaris Hansen, systkinabarnið, var fastur skipari, men hendan túrin var tað Jákup Oluf á Lakjuni. Tað gekk so illa at fáa fólk við skipunum hesa tíðuna. Zelindu dámdi einki at eg fór.

Hetta var ein lort túrur.Vit fingu nógvan fisk, men tað gekk illa at arbeiða hann undan. Tað var so ógvuliga kalt. Tí kom nógv av fiskinunum frystur í lastina. Hetta kom at merkja, at nógv minni fekst fyri hann. Vit fingu einki fyri ein triðing av lastini, og var hetta eitt bakkast.

Eg var síðan tvey ár í turkihúsinum í Syðrugøtu sum formaður saman við Sverra hjá Havna Jákup, tann kendi yrkjarin Jákup Hansen, sum giftist til Gøtu. Hetta var áðrenn teir fóru at skera flak, so vit virkaðu bert klippfisk.

**Vildi ikki vita av sjálvdrátti**

Eg hevði fyrr verið burtur við Kyrjasteini hjá Jákup Haraldsen í Fuglafirði. Eg fór eitt ár aftur við Kyrjasteini til Grønlands við Per Gregersen, systkinabarninum, sum skipara.

Men eg hevði altíð ynskt mær at sleppa at rógva út undir Føroyum. Eg fór tá við Kelduni hjá Jens Klæmint Isaksen í Klaksvík. Formaður í 1953 var Petur á Regni í Lorvík. Hann var kunnugur við leiðirnar undir Føroyum og dugdi væl at fáa fisk.

Vit fóru eisini ein saltfiskatúr við snøri til Íslands í 1954.

Eg spurdi, áðrenn vit skuldu fara, um tað fór at vera sjálvdráttur ella felagsveiða. Vit høvdu jú beint verið til línufiskiskap, og har fingu jú allir líka. Nei, var svarið, sjálvsagt skuldi tað vera sjálvdráttur. Tá kýttu menn seg meira. Eg sigi, at so komi eg ikki við. Mær dámdi ikki, at allir ikki skuldi fáa somu løn, hóast eg hevði væntað mær mín part við sjálvdrátti.

Tað var so í lagi, at vit fóru til felagsfiskarí. Tað gekk heilt væl, og vit fingu uppí.

Seinni keypti Petur skip sjálvur. Tá gjørdist Hellu Meinard (Jensen) skipari. Sum navnið sigur, var hann ættaður av Hellunum. Hann var giftur við Onnu Martinu, systkinabarninum, dóttir Tummas Hans Hansen og Elisabeth fastur. Seinni var Meinhard skipari á Báruni, sum Eivind hjá Havna Jákup átti.

**Aftur við Sámal Hans**

Eg fór so umborð á Gulenni, sum Leon svágur átti. Nú kom eg aftur saman við Sámal Hans, sum eg fór til skips við fyrstu ferð við Henry Freeman.

Vit fóru til Íslands, og her var aftur felagsfiskarí. Vit fingu eisini væl og virðuliga uppí skipið, meðan onnur skip við sjálvdrátti fóru heim við hálvari last.

Sámal dugdi væl at fiska. Vit fóru eitt kvøld út úr Íslandi, og Sámal legði at fiska. Men tað var eingin fiskur. So fóru vit at sigla út eftir, til vit komu á 100 favna dýpi. So varð lagt. Tað var kolsvart í mjørka. Eg var kokkur, og varð vaktur um morgunin. Tá var dekkið smekkfult av fiski, stórum toski. Eg fari so og purri Sámal út. Hann var púra býttur, tá ið hann kom upp. Vit stóðu so við snøri til middags. Vit fóru at gera reint og vóru lidnir til nátturðatíð.

Sámal dugdi hetta her við at andøva uppi yvir fiskinum. Vit fingu nógvan fisk alla vikuna, samstundis sum tað var kolsvart í toku. Vit fingu ongantíð botn. Snørið fór eitt gott stykki (60 favnar) niður, og so tók. Tað vanliga var annars, at tað fóru eini tvey stykki út av snørinum.

Við endan av vikuni var einki salt eftir, og vit fiskaðu uppá dekkið. Vit fóru inn á Seyðisfjørðin at fáa salt, og so varð farið heim. Hetta gjørdist ein slíkur roktúrur. Tann stóri toskurin gav jú eisini so høgan pris.

Hetta var kallað "á Rokinum." Sum navnið sigur, man her hava verið fiskur. Miðið var, at teir skuldu sigla, tá ið klárt varð eystur úr nesinum, so nesið kom í vatn, sum tað varð sagt.

Bátarnir lógu norðanfyri (Langa)nesið, so hann man hava verið lágur í ættini. Teir fóru allir út á nesgrynnuna at royna. Hinir bátarnir fóru so roynandi suðureftir. Allir fóru heim við hálvari last. Vit vóru teir einastu sum fingu uppí.

**Um Sámal Hans**

Sámal Hans var ein av royndastu skiparunum í Gøtu. Hann var føddur 31. august 1902 og tók skiparaprógv hjá Djurholm í 1925. Hann fór til skips í 1918 við Napoleon Jensen, Gøtu Pola, sum vaks upp í Blásastovu í Norðragøtu. Sámal var við honum í trý ár. Í 1921 og 1922 var hann við Only Sister við Tummas Sigvald Thomsen við Gil í Norðragøtu.

Á vári 1924 var Sámal Hans við motorbátinum Brynhild í

Sosialurin